# ARSENAL RENNUR AFTANÁ

**Meðan Chelsea og Manchester United hava styrkt munandi um hópin, gongur heldur striltið hjá Arsenal. Felagið hevur mist størsta profilin á liðnum seinnu árini, og higartil er eingin stórvegis styrkur komin**

PREMIER LEAGUE
*Uni Holm Johannesen*

Um ein góðan mánað fer Premier League aftur av bakkastokki. Eins og undarfarna ár hava feløgini verið í pengapunginum og roynt at tryggja sær kærkomnan styrk. Kortini er rættuliga misjavnt, hvussu tað hevur eydnast ymisku feløgunum at finna røttu leikarnar. Meðan summi feløg longu hava fingið fatur á leikarunum, tey hava dyrgt eftir, gongur heldur truplari hjá øðrum.

### Styrkt Chelsea

Chelsea hevur aftur í summar styrkt munandi um hópin. Asier Del Horno, ið hevði eitt gott kappingarár í spanska felagnum Athletic Bilbao, skrivaði tíðliga í summar undir avtalu við ensku meistararnar, og Scott Sinclair er eisini komin úr Bristol Rovers. Eisini er avtala gjørd við Shaun Wright-Phillips, og eftir útlegd í Milan í eitt ár, vendir vandamikli framherjin, Hernan Crespo, eisini aftur til Chelsea.

Tó hevur frágongdin verið stór. Teir tríggir, Mateja Kezman, Scott Parker og Mikael Forsell, ið ongantíð slógu ígjøgnum í felagnum, hava allir valt at fara aðrar leiðir.

Lítið og einki verið at hoyrt um grannarnar úr Arsenal, sum flestu vænta aftur í ár fara at liggja í oddinum við Chelsea og Manchester United. Higartil er bara Alexander Hleb komin úr týska Stuttgart. Í farnu viku skrivaði størsta stjørnan á liðnum seinastu árini, Patrick Vieira, undir við Juventus, og fyrr í summar mistu teir braslianska miðvallaran Edu til Valencia.

Kappingarárið í fjør hilnaðist ikki nakað serligt hjá Manchester United. Eitt triðja pláss í Premier League og tap í FA Cup finaluni var ikki nøktandi, og hevur liðið tí styrkt hópin til komandi kappingarár.

Stóri trupulleikin á liðnum seinnu árini hevur serliga verið málverjin. Fleiri hava roynt at lyft arvin eftir Peter Schmeichel, men enn hevur tað ikki eydnast nøkrum teirra. Men nú tykist trupulleikin at verða loystur. Felagið skrivaði fyrr í summar undir avtalu við Edwin Van Der Sar, ið er komin úr Fulham.

Eisini er miðvallarleikarin Ji-Sung Park komin úr PSV eftir eitt framúr gott ár í hollendska felagnum. Hann verður tann fyrsti koreanarin í Premier League nakrantíð.

Saman við Chelsea, Arsenal og Manchester United má Liverpool verða eitt gott boð upp á ein møguligan meistara komandi kappingarár. Nýkosnu Champions League vinnararnir hava styrkt hópin við Boudewijn Zenden, Antonio Barragan, José Reina, Mohamed Sissoko og Peter Crouch. Eisini er leiguavtala gjørd við Mark Gonzalez.



*Fyrrverandi liðformaðurin hjá Arsenal, Patrick Vieira, hevur nú skrivað undir við italska meistaraliðið Juventus. Spurningurin er, hvussu Arsenal fer at standa seg uttan sterka miðvallaran*

### Dani til Everton

Everton tók í fjør øll og alt á bóli og endaði á einum fjórða plássi í Premier League, ið eisini gevur atgongd til Champions League. Fleiri søgur hava verið at hoyrt um leikarar, ið skuldu veri á veg til Everton. Men enn eru bara Simon Davies og danin Per Krøldrup komnir úr ávíkavist Tottenham og Udinese.

Málsetningurin hjá bæði Tottenham og Newcastle seinnu árini hevur verið at koma upp í oddin aftur. Men hetta hevur ikki hilnast nakað serligt. Bæði liðini endaðu í miðjuni farna kappingarár og tað var ikki nøktandi.

Nógv rok hevur verið um skiftið hjá stjóranum í Tottenham, Frank Arnesen, til Chelsea. Tó hevur felagið styrkt hópin við stjørnuskotunum, Aaron Lennon og Wayne Routledge. Aftrat teimum eru Paul Stalteri og Teemu Tainio eisini komnir.

Hjá Newcastle hevur talan eisini verið um tilgongd. Scott Parker er komin úr Chelsea, meðan turkiski miðvallarin Belozoglu Emre hevur skift bláu strípurnar hjá Inter út við hvítu strípurnar hjá Newcastle.

### Trupult hjá uppflytarunum

Seinnu árini hevur tað víst seg at vera sera trupult hjá uppflytarunum at verða verandi í deildini. Soleiðis verður helst eisini í ár. Hjá Wigan, sum í ár fer leika í Premier League á fyrsta sinni, hevur talan ikki verið um nakran serligan styrk. West Ham hevur fingið málverjan Roy Carrol sum tað stóra navnið, meðan Sunderland hevur fingið unga framherjan Jon Stead úr Blackburn.

## FAKTA

Dýrastu handlarnir í summar

| | | | |
|---|---|---|---|
| Shaun Wright-Phillips | Chelsea | Manchester City | £21,000,000 |
| Alexander Hleb | Arsenal | VfB Stuttgart | £9,940,000 |
| Asier Del Horno | Chelsea | Athletic Bilbao | £8,000,000 |
| Yakubu Ayegbini | Middlesbrough | Portsmouth | £7,500,000 |
| Peter Crouch | Liverpool | Southampton | £7,000,000 |

# Renning á ólavsøku

RENNING
*Tíðindaskriv*

Mikudagin tann 27. juli kl. 18.00 skipar Bragdið fyri rennikappingum á Skálatrøð í Havn. Kappast verður í ymsum bólkum hjá bæði vaksnum og børnum. Startur og mál í øllum kappingunum er á Skálatrøð.

Byrjað verður kl. 18.00, tá vaksin renna 5 km. Runnið verður nakrar ferðir runt niðri á Skálatrøð og út á Bakka.

Hóast øll tey vaksnu byrja í senn, so verður kappast í tveimum aldursbólkum: vaksin født í 1987 ella fyrr, og vaksin fødd í 1959 ella fyrr (veteranar). Heiðursmerki verða latin til nr. 1, 2 og 3 í báðum bólkunum.

Kappingin á Ólavsøku er samstundis síðsta umfar í árligu Grand Prix kappingini fyri vaksin og børn. Á heimasíðuni www.athletics.fo er kunning um støðuna í Grand Prix kappingini, undan Ólavsøku.

Børnini byrja at renna kl. 18.30 tá dreingir og gentur - 7 ár (f. 1998 ella seinni) renna eina ferð runt, t. e. 600m. Síðani renna dreingir og gentur - 10 ár (f. 1995-1997) sama tein.

Tey størru børnini skulu renna tvær ferðir runt, t. e. 1200 m. Kappast verður í hesum bólkum: dreingir og gentur - 13 ár (f. 1992-1994) og dreingir og gentur - 17 ár (f. 1988-1991).

Nr. 1, 2 og 3 í teimum ymisku bólkunum hjá gentum og dreingjum fáa heiðursmerki.

Handan av steypum til nr. 1, 2 og nr. 3 í Grand Prix kappingini hjá bæði vaksnum og børnum, verður eftir at fremstu rennararnir í ólavsøkurenninginí eru heiðraðir.

Tilmelding kann bert gerast á www.athletics.fo og startnr. skal heintast uttan fyri handilin hjá P/F Valdemar Lutzen kl. 17.00-18.00. Luttøkugjald kr. 50,00 fyri vaksin og kr. 30,00 fyri børn skal gjaldast í sambandi við avheintan av startnr. Tilmeldingarfreistin er úti týskvøldið tann 26. juli.

### Skrá:

17.00 Heintan av startnummari á Skálatrøð (Valdemar Lutzen)
18.00 Vaksin (fødd í 1987 ella fyrr) renna 5 km
18.30 Børn - kappast í hesi raðfylgju:
Børn - 7 ár (f. 1998 ella seinni) renna 600m
Børn - 10 ár (f. 1995-1997) renna 600m
Børn - 13 ár (f. 1992-1994) renna 1200m
Børn - 17 ár (f. 1988-1991) renna 1200m
Heiðursmerkja og steypahandan verður aftaná kappingarnar.

## AB skipar fyri ungdómskapping

FÓTBÓLTUR
*Tíðindaskriv*

Argja Bóltfelag skipar skipar fyri 7. ferð fyri fótbóltskapping á Argjum. Kappingin verður fyri yngru deildirnar og verður í døgunum 12. og 13. august.

Flest allir ungdómsleikarar liggja stillir í bestu tíð á árinum at leika fótbólt. Tað er stórt spell, tí summarfótbóltur átti at verði tikin í størri álvara.

AB skipar tí fyri fótbóltskapping á Argjum. Kappingin verður í døgunum 12. og 13. august, íð er ein vika áðrenn fótbólturin byrjar eftir summarfrítíðina.

Kappast verður í hesum deildum, pinkulingar , smápiltar, piltar, smádreingir, dreingir , pinkur, gentur 10-12 ár, gentur 12-14 og gentur 14-17 ár.

Leikt verður á hálvum vølli, tó leika pinkur og pinkulingar á hálvum vølli. Leiktíðin er tvey umførð á sjey minuttir.

Nr. 1, 2 og 3 fáa heiðursmerkir, umframt at øll vinnandi liðini fáa steyp til ognar. Tilmeldingarskjøl eru send feløgunum, og seinasta freist at melda lið til kappingina er 1. august. Kappingin hevur verið væl vitjað undanfarin ár, og luttøkan er avmarkað.

Kunning um kappingina fæst eisini á heimasíðu felagsins www.ab.fo.